UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ

*Mál nr. 24/27238*

# Vegleiðing

*til kommunur at fylgja, tá umbøn um góðkenning av broyting í **býarskipan** verður send Umhvørvismálaráðnum til góðkenningar sambært § 1 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir*

Tá kommuna sendir umbøn til Umhvørvismálaráðið um góðkenning av broyting í býarskipan, er neyðugt, at niðanfyri nevndu skjøl og upplýsingar fylgja við umbønini í hesi røð:

1. Avrit av seinast áteknaða yvirlitskorti yvir kommununa ella bygdina/býin, sum vísir galdandi góðkendu býarskipanina fyri øki.
   1.1. Kortið eigur at vera í hóskandi støddarlutfallið (tó í mesta lagi 1:1.500), soleiðis at allar ásetingar í býarskipanini eru væl sjónligar.
   1.2. Er talan um stórt øki, kann yvirlitskortið verða býtt í tvey ella fleiri kort, soleiðis sum neyðugt og hóskandi er.
   1.3. Einstaka kortið eigur ikki vera størri enn A3 og ikki minni enn A4.

2. Kort, sum greitt vísir ítøkiligu broytingarnar í býarskipanini, sum ætlanin er at gera.
   2.1. Kortið eigur at vera í hóskandi støddarlutfallið (tó í mesta lagi 1:1.500), soleiðis at ætlaðu broytingarnar í býarskipanini eru væl sjónligar.
   2.2. Tá mark ímillum øki í býarskipanini ikki fylgir náttúrligari avmarking, so sum á ella veg, eigur markið at kunna staðfestast objektivt á annan hóskandi hátt (t.d. við fixpunktum ella koordinatum).
   2.3. Á kortinum mugu allir matrikklar verða merktir við sínum matrikkulnummari.

3. Yvirlit yvir allar matrikklar, sum vera ávirkaðir av ætlaðu broytingini í býarskipanini, antin tí áseting, sum er galdandi fyri matrikkulin verður broytt, ella tí at áseting fyri grannamatrikkul verður broytt.

4. Frágreiðing um hvørja einstaka broyting í verandi býarskipan, sum ætlanin er at gera og grundgeving fyri, at broytingin er neyðug, skynsom og hóskandi út frá býarskipanarligu heildaratlitunum hjá kommununi.

4.1. Frágreiðingin og grundgevingarnar, nevndar í pkt. 4, mugu vera neyvt tær somu, sum standa í uppskotinum um broyting í býarskipanini, sum kommunustýrið hevur samtykt.

4.2. Frágreiðingin og grundgevingarnar, nevndar í pkt. 4, mugu vera neyvt tær somu, sum eru lagdar fram til alment eftirlit sambært § 6, stk. 1 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir.

5. Úrrit úr gerðabók frá kommunustýrisfundi, sum gevur eina fullfíggjaða mynd av politisku viðgerðini, sum uppskotið um broyting í býarskipanini hevur fingið til og við at broytingin var samtykt av kommunustýrinum.

6. Avrit av kunngerð sambært § 6, stk. 1 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, og frágreiðing um, nær og hvar kunngerðin hevur verið lýst.

7. Yvirlit yvir øll hoyringarskriv, sum kommunan hevur fingið rættstundis í sambandi við almenna eftirlitið.

   NB: Øll hoyringarskriv, sum verða send kommununi, í sambandi við almenna eftirlitið sambært § 6, stk. 1, skulu leggjast fyri kommunustýrið til viðgerðar og støðutakan.

8. Úrrit úr gerðabók frá kommunustýrisfundi, sum gevur eina fullfíggjaða mynd av politisku viðgerðini, sum skriv, innkomin í sambandi við almenna eftirlitið, hava fingið.

9. Avrit av øllum svarskrivum frá kommununi til skriv, innkomin í sambandi við almenna eftirlitið.

   NB: Øll innkomin skriv skulu viðgerast og svarast sum hoyringarskriv sambært vanliga fyrisitingarrættinum. Tað merkir, at kommunustýrið ítøkiliga og sakliga skal viðgera og taka støðu til tað, sum ført verður fram í einstaka skrivinum, og, um tað er viðkomandi, grundgeva sakliga fyri, hví kommunustýrið ikki tekur undir við innkomnum mótmælum ella broytingaruppskotum.

   Tá kommunustýrið viðgerð og tekur støðu til innkomin mótmæli og broytingaruppskot, má kommunustýrið hava somu fyrilit, sum kommunustýrið hevði, tá kommunustýrið viðgjørdi og samtykti at broyta býarskipanina.

   Førir viðgerðin av hoyringarskrivum til, at kommunustýrið broytir upprunaligu grundgevingarnar fyri uppskotinum, samanber við pkt. 4.1 og 4.2, ella førir kommunustýrið fram nýggjar grundgevingar fyri uppskotinum, má broytta uppskotið leggjast fram til alment eftirlit av nýggjum sambært § 6, stk. 1 í løgtingslóg um

býarskipanir og byggisamtyktir við eftirfylgjandi viðgerð, sum ásett í hesi vegleiðing, áðrenn Umhvørvismálaráðið kann taka støðu til góðkenning.

10. Yvirlitskort yvir kommununa ella bygdina/býin, sum er dagført samsvarandi uppskotinum um broyting í býarskipanini, sum kommunan biður Umhvørvismálaráðið góðkenna.

    10.1. Kortið má lúka somu krøv, sum nevnd eru í pkt. 1, umframt tað, sum ásett er í pkt. 2.2 og í pkt. 10.2.

    10.2. Í niðara høgra horni á hvørjum einstøkum korti skal vera ein rútur á 65 x 30 mm (breidd x hædd), sum Umhvørvismálaráðið skal brúka til átekning. Rúturin má ikki fjala útyvir týðandi upplýsingar í kortinum.

    10.3. Í yvirlitskortinum, sum verður sent Umhvørvismálaráðnum at átekna, mugu ongar aðrar innihaldsligar broytingar verða gjørdar í mun til seinast góðkendu býarskipan, enn tær, sum kommunan biður Umhvørvismálaráðið um at góðkenna.

Umhvørvismálaráðið 20.01.2025

**Hilmar Høgenni**
*deildarstjóri*